# Skál fyri útlendskari framleiðslu!

BJØRT SAMUELSEN
Tjóðveldi



Føroyingar kunnu framvegis drekka alskyns løg, sterkari enn 5,8%. Einasta treytin er, at tað ikki er øl, og at vøran er framleidd uttanlands.

Enn einaferð er málið um at broyta rúsdrekkalógina felt, hóast stór undirtøka tykist vera fyri tí. Nøkur fá tingfólk sleppa at ráða og gera av, at føroyingar bert tola veikt øl, men gjarna mugu drekka vín, heitvín og brennivín – bara tað er útlendskt.

Endamálið við broytingunum í rúsdekkalógini var heilt einfalt at taka burtur tann mismun, sum í dag verður gjørdur millum útlendska og føroyska vinnu, og at geva bryggjarívinnuni møguleika at mennast – bæði í egnum landi, og uttanfyri landoddarnar. Vit hava í løtuni í minsta lagið tvær fyritøkur, umframt verandi bryggjarí, sum kundu hugsað sær at framleitt í Føroyum. Onnur teirra útflytur vatn, framleiðir uttanlands, og flytur innaftur brennivín.

Hví skulu vit, sum búgva í Føroyum, ikki sjálvi kunnu gera av hvat slag av øli vit drekka, tá vit kunnu drekka tað okkum lystir av eitt nú víni? Og hví skulu útlendingar frítt sleppa at framleiða vørur til okkara marknað, sum vit nokta okkara egnu vinnu at framleiða? Hetta er at leggja nakrar púrasta órímiligar forðingar fyri føroyskari framleiðslu og yvirformyndandi bond á borgaran.

Øl hevur søguliga longst siðvenju í norðurlendsku mentanini, er tí er ilt at skilja, hví mjøður er settur í skammikrók. Forboðið at fara upp um 5,8% er serføroyskt, og alla aðrastaðni er loyvi at bryggja sterkt - við undantaki av einstøkum londum, sum hava fullkomið bann fyri rúsdrekkaframleiðslu og -sølu.

**Felt fyri aðru ferð**

Tá málið um at broyta rúsdrekkalógina varð lagt fram í undanfarnu tingsetu, varð tað felt, millum annað við teirri grundgeving, at landsstýrismaðurin fór at koma við einum líknandi uppskoti. Men tá landsstýrismaðurin boðaði frá, at hann ikki slapp at leggja uppskotið fram, valdu vit at leggja málið framaftur. At andstøðan leggur slík uppskot fram, tykist vera einasti møguleiki fyri at lata Løgtingið sleppa at siga sína hugsan um málið. Ímeðan landsstýrismaðurin fyrru ferð mælti Løgtinginum til at fella málið, gav hann hesaferð samgonguni grønt ljós at atkvøða sambært egnari sannføring. Tey vóru sostatt ikki bundin av at vera loyal yvirfyri landsstýrismanninum. Men málið varð kortini aftur felt.

**Atkomuligheit óbroytt**

Lógaruppskotið broytti ikki uppá útsølumynstrið ella atkomuligheit til øl og rúsdrekka. Bryggjaríini skuldu framvegis varðveita sínar útsølur við somu vørum sum í dag, ímeðan alt, sterkari enn 5,8% einans kundi seljast gjøgnum handlarnar hjá Rúsdrekkasølu landsins – júst sum í dag.

Og vit kunnu nú framvegis fara beina kós í Rúsuna og keypa eina fløsku av Cognac úr Fraklandi, andalusiskt sherry, spanskt vín úr, Ålborg akvavit, finskt vodka og skotskt whisky. Men føroyskan hvonnsnaps ella rabarbuheitvín? Tað skal framvegis vera bannað ...

# Javnaðarflokkurin sigur nei til lønarsteðg við lóg

EYÐGUNN SAMUELSEN



Tað er ein løgin samanbering, formaður Fólkafloksins kemur við, tá ið hann sigur, at fimm ára lønarsteðgurin hjá Fólkaflokkinum bert er eitt framhald av uppskotinum hjá Javnaðarflokkinum um tvey ára lønarsteðg. Tað er also ein markantur munur á at steðga lønum við lóg, sum Jørgin og Fólkaflokkurin vilja, og so onga lønarframskriving at gera, sum vit mæla til.

Borgarligi vongurin í samgonguni, t.e. serliga Fólkaflokkurin heldur, at vit skulu seta fría rættin til samráðingar um lønir úr gildi komandi fimm árini. Ikki nóg mikið víð tí, so mæla teir eisini til setunarstegð í sama tíðarskeiði. Hvat skulu ungir vælútbúnir føroyingar hugsa, tá teir liggja á ferð at koma heimaftur. Heim til eitt land, har lønirnar eru fastfrystar í fimm ár, og har eingin verður settur í starv hjá tí almenna í sama tíðarskeiði.

Tað, sum vit hava sagt er, at vit ynskja ikki at framskriva við nakrari lønarhækking komandi tvey árini. Hetta merkir, at samlaði lønarposin verður tann sami, men vit leggja okkum als ikki út í, um lønirnar hækka ella ikki. Hækka tær, so verður posin við pengum ikki størri av tí orsøk, og tað merkir so aftur, at tilsvarandi sparingar skulu fremjast. Men vit leggja okkum ikki út við lóg at forða pørtunum í at føra samráðingar.

Annað er so, at vit ikki vænta, at feløgini fara ikki at leggja seg so nógv eftir lønarhækkingum til heystar, men ivaleyst fara at leggja stóran dent á onnur viðurskifti í sáttmálunum. Men tað fáa vit so at síggja til ta tíð.

Men aftur til Jørgin á Vágaportalinum. Nei, als ikki hava Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin somu sjónarmið viðvíkjandi lønarstegði. Tit vilja lóggeva lønarsteðg, vit vilja steðga lønarframskrivingum av lønum.

# Vána tøkk til lokomotivið í føroyskari fiskivinnu í meir enn heila øld

ELSEBETH GUNNLEYGSDÓTTUR HANSEN
býráðslimur í Klaksvík



At arbeiðsbólkurin hjá Helenu Dam á Neystabø er komin fram til, at allar tær maritimu útbúgvingarnar skulu flytast til Havnar er ikki meira enn natúrligt. Víð teim serútvaldu fólkunum, sum hon hevur útvalt til sín havnararbeiðsbólk var ikki annað væntandi. Úrslitið var ikki óvæntað við slíkari samanseting.

Nei Helena, onki skulu tær maritimu útbúgvingarnar til Havnar. Ongin arbeiðsbólkur úr Havnini kemur at avgera, hvar allar tær maritimu útbúgvingarnar skulu vera. Tíbetur verða tað okkara politikarar, sum skulu avgera tað og ikki bara tú og tín kæri arbeiðsbólkur. So væl spælir klarverið heldur ikki.

Gloym ikki, at vit hava landspolitikarar, sum hava skyldu til at arbeiða fyri øllum landinum og ikki bara Suðurstreymi. Tær maritimu útbúgvingarnar liggja mest natúrliga í Klaksvík, eisini í søguligum høpi. Klaksvíkin hevur verið ein av størstu drívkraftunum í føroyskari fiskivinnu í meir enn eina øld og er tað framvegis. Klaksvíkin hevur soleiðis verið við til at goldið sín part av landshúsarhaldinum í ríkiligt mát og skal hetta nú veruliga verða tøkkin, eina vána tøkk má sigast.

Gloym ikki, at tað eru vit norðoyingar sum í stóran mun hava upparbeitt tørvin á teim maritimu útbúgvingunum, og Havnin í nógv minni mun.

**Skúlar í Havn**

Mestsum allar útbúgvingar í Føroyum í dag eru í Havn. Burtur úr rúgvuni kunnu nevnast Fróðskaparsetrið, Føroya Læraraskúli, Pedagogútbúgving, Sjúkrarøktarfrøðiskúlin, Tekniski skúlin, Vinnuháskúlin, Føroya Fólkaháskúli (fluttur úr Klaksvík), Studentaskúlin, Handilsskúlin.

**Stovnar í Havn**

Á netinum kann man síggja ymsar stovnar, sum eru í Havn og upp á 10 min kundi man síggja hesar: Føroya fornminnissavn, landsbókasavnið, landsskjalasavnið, náttúrugripasavnið, Kringvarp Føroya, mentannargrunnur landsins, innlendismálaráðið, uttanríkisráðið, mentamálaráðið, almannamálaráðið, heilsumálaráðið, løgmansskrivstovan, fíggjarmálaráðið, vinnumálaráðið, ALS, landsfólkayvirlitið, Hagstovan, vinnuhúsið, samtak, altjóða skrivstovan, kommunusamskipan Føroya, Føroya kommunufelag, Amnesty International, Føroya deild,, javnstøðunevndin, fiskimannafelagið, fiskimálaráðið, fiskiveiðieftirlitið, vinnuframagrunnurin, listasavn Føroya, Norðurlandahúsið, Tjóðpallur Føroya, Bókamiðsølan, Skúlabókagrunnurin, Fólkaskúlaráðið, virðislønanevndin, yrkisútbúgvingarráðið, granskingarráðið, granskingargrunnur, royndarstøðin biofar, granskingardepilin fyri økismenning, Norðoyatunnilin (skuldi sjálvandi ligið í Klaksvík)

Sum sæst omanfyri, so eru flest allir skúlar í Havn og so ein rúgva av øðrum almennum stovnum. Vónandi verður hetta eisini ein partur av metingini hjá okkara landspolitikarum, tá støða skal takast til, hvar Vinnuháskúlin skal staðsetast. Sum sæst her, so er ovmikið at taka av í Havn og er tað tí ikki meir enn rímiligt at Klaksvík fær vinnuháskúlan.

Eg veit, at fíggjarlógin var við at verða koyrd í "tusen bitar", um norðingar fingu tunnil norður um fjall, ella sandingar fingu undirsjóvartunnil. Tit fingu yvirtalað meirilutan um, at tað var skeiv raðfesting. Tá tað snúði seg um at byggja marknagilsskúlan tá bar betri til. Vit ivaðust í, um tað var Lady Di, tann tíð tað var, sum blitzini brustu í andlitid á tykkum øllum. Nú var veitslurómur tí onki var so natúrligt sum at marknagilsskúlin skuldi byggjast. Ein íløga uppá fleiri hundraðtalsmilliónir.

Nakað seinni kemur fram, at Heilsutrygd skal til Klaksvíkar. Hvat hendir? Jú fleiri havnarpolitikarar ganga fullkomiliga amok, tí nú skulu uml. 8 nýggj arbeiðspláss til Klaksvíkar. Skulu nú allar tær maritimu útbúgvingarnar úr Klaksvíkini afturfyri ella hvat?

Okkara fólkavaldu umboð her norðuri "Verið vakin", tí tað næsta, sum kann henda verður, at ein havnararbeidsbólkur verður settur um sparingar. Tað kann vera sera skjótt - ja er longu nú - at teir finna útav, at sparast skal í útjaðaranum. Eitt er heilt sikkurt, at tað verður trupult hjá havnarfólki at spara í Havn.

Eri rættuliga vís í í úrslitinum, um ein arbeiðsbólkur bleiv settur at kanna hvat loysti seg best fíggjarliga. At allir føroyingar blivu fluttir til Havnar, ella teir búðu spjaddir runt Føroya Land. Skuldu vit so avtoftað allar býir og bygdir runt Føroya land og flyta alt til Havnar? Er tað tað vit vilja? Nei neyvan hevði havnararbeiðsbólkurin ætlað tað. Onkur skal jú gera tað tunga arbeiðið.

Spurningurin er, hvussu vit skulu yvirliva her norðuri. Vit hava kanska brúk fyri eini líka so lokalari Helenu her norðuri. Men vit hava valt og fingið eina rúgvu av landspolitikarum her norði frá.

Eg vil heita á tykkum og vænti eisini av tykkum, at tit nú standa saman, soleiðis at Helena ikki dregur tykkum eftir hárinum. Tit mugu reisast nú og geva krút og tala okkara søk her norðuri. Ikki einans nokta Helenu at gera sum henni lystir. Tit eiga eisini at klára at skaffa okkum fleiri arbeiðspláss.

Til okkara landspolitikarar, skaffið okkum fleiri føst, støðug og vitannartung arbeiðspláss. Vit eru ein stórur partur av landinum. Tit skylda okkum hetta. Sum tit vita, hava vit bráðfeingistørv á hesum størvum. Vit missa og hava longu mist stóran part av okkara lærda ungdómi. Um onki munagott verður gjørt beinanvegin koma vit framhaldandi at missa fólk.

Allur okkara lærdi ungdómur endar í Havn, tí har eru størvini og høgu lønirnar. Fyrr ella seinni endar allur kapitalurin har eisini. Tá verður alt stýrt úr Havnini, og tað er júst tað, sum er við at henda nú.

Nú tit hava fingið tað álit frá okkum her norðuri, eiga tit at brenna fyri hesum øki og kempa til tað síðsta fyri at vit skulu yvirliva sum ein býur.

Tit eiga at vísa okkum tað virðing og liva upp til tað álit norðingar vístu tykkum. Tit standa í skuld til okkum veljarar. Handlið nú.

Innast inni havi eg tað álit á tykkum, at vit fara at ríða henda vandasjógv av okkum.